# Vátt og grátt

**EM-UNDANKAPPING** Tað er næstan súmbolskt, at veðrið í Ljubljana ikki er betri enn tað sama. Slovenar eru nevniliga svangir eftir trimum stigum, og tá okkara mans hava tapt tríggjar teir tríggjar dystirnar í undanumfarinum, har málúrtøkan teir báðar seinastu dystirnar sigur -9, so sær tað ikki lætt út

Rólant Waag Dam

Tað hevur ikki verið nøkur dreymabyrjan, Brian Kerr og hansara menn hava fingið upp á hesa EM-undankappingina. Trý tap, fyrst so tepurt sum tað yvirhøvir kundi vera móti Estlandi, men síðani tvey av teimum heldur stóru móti Italia og Serbia.

Einki stig og tíggju mál í gjøgnum er beiski veruleikin. Eitt mál hava vit tó fingið, eitt frálíkt mál frá Jóan Símuni Edmundsson. Men tað munar ikki so nógv, tá føroyska liðið sum tað einasta við trimum dystum í skjáttuni, enn hevur fyrstu stigini til góðar.

Nú skulu okkara mans so royna seg á fjórða sinni í hesi undankappingini. Brian Kerr hevur tikið 21 mans við sær til Slovenia. Tvey av níggju nøvnunum, Kerr háleði úr hattinum hesaferð, hava givið avboð, Pauli G. Hansen úr EB/Streymi og Víkingurin Erling Jacobsen.

Fyri hesar eru gamli kenningurin á landsliðnum Hjalgrím Elttør og U21-landsliðsleikarin Rógvi Baldvinsson komnir. Síðstnevndi er verjuleikari, spælir við Ålgård í triðbestu norsku deildini, og hevur staðið seg sera væl á U21-landsliðnum.

## Kerr ger sum hann plagar

Rógvi Baldvinsson er ikki endiliga tað kendasta navnið á føroyska fótbóltspallinum. Men tað eigur eftir hondini ikki at koma óvart á nakran, at Brian Kerr hevur fyri vana at taka minst ein púra óroyndan mann inn í hópin, hvørjaferð tá landsliðið er savnað.

Hesaferð var tað so U21-landsliðsleikarin. Áður hevur tað verið Jústinus R. Hansen, Brian Olsen, Karl Løkin, Henrik Rubbeksen og Rógvi Poulsen, fyri bara at nevna nakrar.

Brian Kerr boðaði tíðliga í skeiði sínum frá, at hetta varð hansara leistur at byrja við. Hansara ynski er at hava ein stóran hóp av leikarum, sum allir kendu til landsliðið og umstøðurnar kring tað, soleiðis at hann seinni kemur at hava eina rúgvu av leikarum at taka av, sum allir í størri og minni mun hava snoddað til landsliðið.

## Hava vant

Teir 21 leikararnir og restin av føroyska ferðalagnum kom til Ljubljana í Slovenia seinnapartin í gjár.

Í gjárkvøldið fóru teir so á vøllin hjá Olympija Ljubljana at venja fyri fyrstu ferð á túrinum. Sambært heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum, regnaði tað illa og tað órógvaði venjingina eitt sindur.

Hinvegin er líkt til, at leikararnir bara skulu venja seg við vátu umstøðurnar, tí sambært somu heimasíðu, so sigur hann frá minni góðum veðri næstu dagarnar. Og á vøllinum fríggjakvøldið er eisini líkt til, at føroysku leikararnir skulu vera fyrireikaðir upp á ein øgiligan slovenskan æling.

Trý stig eru eitt krav frá slovenska venjaranum. Dysturin byrjar tó við málleysum javnleiki og einum stigi til hvørt liði. Men tær báðar ferðir føroyska fótbóltslandsliðið hevur spælt móti tí slovenska, hevur hetta ongantíð verið endaliga úrslitið.

*rolant@sosialurin.fo*



*Jákup Mikkelsen vardi eisini føroyska málið í minniliga 2-2 javnleikinum móti Slovenia á Svangaskarði*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Jákup hevur roynt tað fyrr

**EM-UNDANKAPPING** Jákup Mikkelsen var við í minniliga 2-2 javnleikinum móti Slovenia í 2000, og saman við Christiani Høgna Jacobsen tapti hann 0-3 í Slovenia fyri júst níggju árum síðani

Rólant Waag Dam

Um Brian Kerr hevur lisið væl upp á føroyska fótbóltssøgu, ella um tað er rein tilvild, hevur ikki eydnast okkum at uppspurt. Men undir øllum umstøðum er tað ein sannroynd, at Jákup Mikkelsen, er tann einasti í føroyska hópinum, sum áður hevur spælt í móti Slovenia og fingið stig.

Valla er tað tí, at Kerr roknar við, at málverjin úr Klaksvík, kann hála eina sensatión heim einsamallur. Men royndir – eisini móti Slovenia – hevur Jákup Mikkelsen í øllum førum, og tað kemur væl við.

## Tvey ymisk lið

Vert er at hyggja nærri at føroyska liðnum, sum fyrstu ferð spældi móti Slovenia tíðliga í september í 2000. Jákup Mikkelsen vardi sum sagt málið. Umframt hann, er ein annar á liðnum, sum framvegis er aktivur í bestu føroysku fótbóltsdeildini, Øssur Hansen.

Liðið henda dagin var annars hetta: Jens Kristian Hansen, Jákup Mikkelsen, Óli Johannesen, Julian Johnsson, Uni Arge, Todi Jónsson, Øssur Hansen, Sámal Joensen og Hans Fróði Hansen. Inn komu Kurt Mørkøre og Jóannis Joensen.

Fara vit eitt gott ár fram í tíðina, til 6. oktober 2001, sá liðið soleiðis út: Jákup Mikkelsen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen, Johan Byrial Hansen, Hans Fróði Hansen, Øssur Hansen, Rógvi Jacobsen, Kurt Mørkøre, Jákup á Borg, John Petersen og Christian Høgni Jacobsen. Inn komu Arnbjørn Danielsen, Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen.

Hesin dysturin var tann seinasti við Allani Simonsen við róðrið. Síðani hava vit bæði havt Henrik Larsen, Jógvan Martin Olsen og nú Brian Kerr.

Níggju ár eru liðin, men vert er at býta merki í, at Jákup Mikkelsen, Rógvi Jacobsen, Jákup á Borg, Christian Høgni Jacobsen og Súni Olsen allir eru menn, sum Brian Kerr hevur arbeitt og framvegis arbeiðir saman við.

Jákup á Borg er tó givin og tað sama kann eisini – viðhvørt – sigast um Jákup Mikkelsen. Rógvi Jacobsen og Súni Olsen eru skaddir og tí ikki við hesaferð, men eru annars stuðulsleikarar á liðnum tann dag í dag, á sama hátt sum Christian Høgni Jacobsen eisini er tað.

*rolant@sosialurin.fo*